**Viðtøkur fyri Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**

Í Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ásett í § 6, stk. 2 at "*kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum , sum verður tikið við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast*".

Við støði í hesari lóg verður Eldraráð skipa í Tórshavnar kommunu.

Umframt tað sum Løgtingslóg nr. 19 frá 7. 2014 apríl um heimatænastu, eldrarøkt v.m. umfatar, eru onnur øki í kommununi sum eru viðkomandi fyri Eldraráðið. Her verður hugsað um t.d. bussleiðina, mentanar- og frítíðartilboð og kommunulæknaviðurskifti. Tí fevna viðtøkurnar fyri Eldraráðið eisini um onnur øki sum beinleiðis hava ávirkan á lívið, sum eldri borgari í Tórshavnar kommunu.

Eldraráðið skal ikki viðgera persónsmál.

**§ 1 Endamál**

Eldraráðið er ráðgevið hjá Býráðnum og fær í lag samskifti millum eldri borgarar og kommununa

*Stk. 2*
Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samstarva við Býráðið umvegis Heilsu- og eldranevndina fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynski og tørv teirra eldru.

*Stk. 3*
Eldraráðið kann koma við hugskotum og skal virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.

**§ 2 Heimild**

Eldraráðið verður tikið við uppá ráð og kann veita býráðnum ráð í eldrapolitiskum spurningum.

*Stk. 2*
Eldraráðið virkar sum bindilið millum eldri borgarar og býráðið í samband við tilrættaleggingina av eldrapolitikkinum

*Stk. 3*
Býráðið kann spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur teimum eldru.

*Stk. 4*
Einstøku býráðsnevndirnar samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.

*Stk. 5*
Eldraráðið kann av sínum eintingum siga Býráðnum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru.

**§ 3 Starvsháttur Eldraráðsins**

Eldraráðið skal kunna seg um ynskir og tørv teirra gomlu og um kommunurnar viðurskifti á eldraøkinum.

*Stk. 2*
Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til eldri borgarar um tilboð og tænastur, broytingar og nýskipanir á eldraøkinum.

*Stk. 3*
Eldraráðið skal halda fast um og útbyggja samskifti við Býráðið gjøgnum framhaldandi meting av tiltøkum á eldraøkinum, og harvið menna og tillaga tey samsvarandi samfelagsmenningini.

*Stk. 4*
Eldraráðið kann samskifta við staðbundnu nevndirnar um mál á eldraøkinum.

**§ 4 Eldraráðsins samanseting**

Valdir vera 5 limir og 3 varalimir til Eldraráðið

*Stk. 2*
Varalimir kunnu eftir áheitan møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt

*Stk. 3*
Valskeiðið fylgir býráðsskeiðinum. Valskeiðið byrjar 1. januar og er 4 ár. Fyri Valskeiðið 2026 -2028 er er valskeiðið bert 3 ár.

*Stk. 4*
Limur í Eldraráðnum kann frítakast fyri limaskap eftir áheitan. Avgerð, um limur verður frítikin, tekur Eldraráðið.

*Stk 5*
Um ein limur í valskeiðnum missir valbari, doyr ella verður frítikin sambært § 4, *stk*. 4, kemur varalimur inn í tí raðfylgju, teir eru valdir.

*Stk. 6*
Er eingin varalimur á varalistanum at seta ístaðin, kann í samráð við Tórshavnar kommunu verða skipað eykavali.

**§ 5 Val til Eldraráðið**

Val til eldraráðið er 4. hvørt ár, fyrstu viku í oktober

*Stk. 2*
Valbari og atkvøðurætt hava allir borgarar í kommununi, sum valdagin hava fylt 60 ár.

*Stk. 3*
Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skriftlig boð um hetta seinasta lagi 4 vikur áðrenn valið verður hildið. Saman við valevnisfráboðanini eigur at fylgja undirskrift hjá minst 5 stillarum, sum lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið. Eingin kann vera stillari fyri meira enn einum valevni.

*Stk. 4*
Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillað.

*Stk. 5*

Valnevndin skipar fyri valinum, og tekur støðu til, hvussu valið fer fram, herundir um freistir, vallistar, atkvøðugreiðsluna, kunngerð og uppgerð av valinum, klagur um valið v.m.
Heilsu- og eldranevndin er valnevnd.

## § 6 Stovnan og arbeiðsháttur

Eldraráðið skipar seg við forfólki, næstforfólki, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.

*Stk. 2*
Eldraráðið ásetir sjálvt fundarskrá sína, hvussu ofta fundir skulu verða, reglur fyri dagsskrá, fundarinnkalling og ráðsins arbeiðshátt.

*Stk. 3*
Dagskrá og fundarfrásøgn skal sendast til Heilsu- og umsorganarfyrisitingini sum almannakunngerð fundarfrásøgnina við virðing fyri tagnarskylduni.

*Stk. 4*
Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Til varalim verður veitt samsýning, tá hann møtir eftir áheitan.

*Stk. 5*
Býráðið setur eina upphædd á fíggjarætlanina at fíggja útreiðslur av- og virksemi hjá Eldraráðnum.

*Stk. 6*
Kommunan veitir skrivstovuhøli, fundarhøli og skrivarahjálp til Eldraráðið.

## § 7 Gildiskoma/íverksetan

Viðtøkurnar koma í gildi, tá tær eru samtyktar í Býráðnum.

## § 8 Broytingar í viðtøkunum

Eldraráðið, ella ein meiriluti, kann koma við uppskoti til Býráðið um broytingar í viðtøkunum.

*Stk. 2*
Býráðið kann koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum.

*Stk. 3*
Broytingar i viðtøkunum koma í gildi, tá tær eru samtyktar í Býráðnum.

## § 9 Um at taka Eldraráðið av

Býráðið kann til eina og hvørja tíð gera av, at Eldraráðið verður tikið av. Áðrenn tílíka avgerð verður málið í góðari tíð frammanundan lagt fyri Eldraráðið til ummælis.

*Stk. 2*
Verður Eldraráðið tikið av, fella allar møguligar ognir v.m. til Tórshavnar kommunu.